## Randi Frederiksberg hevur fyrilestur



Randi Frederiksberg fer mánakvøldið 14. at hava fyrilestur um avleiðingar av oljuvinnu í Føroyum

FYRILESTUR
*Stefan í Skorini*

Fundarkvøldini hjá Kvinnufelagnum halda fram í nýggja árinum. Mánakvøldið 14. januar klokkan 19.30 verður hildið fram, og tá heldur Randi Frederiksberg cand.scient. tann fyrsta fyrilesturin í árinum.

Fyrilesturin fer at snúgva seg um samfelagsligar avleiðingar av oljuvinnu, og heitið á honum er: Møguligar avleiðingar av eini føroyskari oljuvinnu sammett við royndirnar í Skotlandi og New Foundlandi.

Kvinnufelagið boðar frá, at øll eru vælkomin, og høvi verður at fáa ein drekkamunn aftaná ella aftur við orðaskiftinum.

## Listaframsýningar í Norðurlandahúsinum

FRAMSÝNING
*Stefan í Skorini*

Komandi tvey vikuskiftini verður listaframsýning í Norðurlandahúsinum. Leygardagin 12. januar klokkan 14 letur málningaframsýningin hjá íslendinginum Bjarna Sigurbjørnsson upp.

Hann er føddur í Íslandi í 1966 og hevur útbúgving frá Listaskúla Íslands og hevur seinni verið á San Francisco Art Institute, har hann varð Master of Fine Arts í 1996. Í San Francisco undirvísti hann eisini saman við professarum sum Sam Tchakalian, Anne Appleby og Julius Hatofsky.

Málningarnir eru abstrakt listaverk, ið eru málað á glas. Hann hevur fyrr sýnt fram í Danmark, Íslandi og USA og hevur fingið sera góð ummæli fyri verk síni.

Framsýningin er í Norðurlandahúsinum til og við 10. februar.

Leygardagin 19. januar klokkan 14 letur ein onnur listaframsýning upp. Tað er framsýningin hjá dananum Lone Schmidt, ið nevnist Farven og Lyset.

Hon er fødd á Møn í 1941 og hevur útbúgving frá Kunshåndværksskolen í Keypmannahavn sum keramikari og sum designari frá Arkitektskúlanum.

Framsýningin Farven og Lyset er ein ferðaframsýning, ið er gjørd í sambandi við útgávuna av bókini við sama heiti. Framsýningin er sýnd fram ymsastaðni í Danmark síðan 1995.

# Bussur útav á Kambsdali

FERÐSLUÓHAPP
*Stefan í Skorini*



*Hesin bussurin hjá Bygdaleiðum fór útav vegnum, tá hann varð tikin av eini sterkari hvirlu*
*Mynd: Øssur Mohr*

Hósdagin seinnapartin fór ein bussur hjá bygdaleiðum útav vegnum á Kambsdali. Førarin var einsamallur í bussinum. Hann slapp at kalla óskaladur frá hendingini og fekk eina skeinu í kjálkan og ilt í fótliðin. Maðurin varð kannaður av einum lækna á staðnum og varð ikki fluttur á landssjúkrahúsi, greiðir løgreglan frá.

Førarin var á veg til arbeiðis, og rutan skuldi byrja í Fuglafirði. Hann kom tó ongantíð so langt.

Bussurin varð brádliga tikin av eini glaðu og syftur omanav vegnum. Reyvin á bussinum liggur einar fimm metrar frá vegnum. Teir flestu rútarnir eru knústir, men annars er bussurin ikki serliga illa farin.

Sagt verður av løgreglustøðini í Runavík, at vindurin ikki var av tí ringasta, men at bussførarin var óheppin at koma í eina ringa glaðu. Tíbetur var bussurin ikki í rutukoyring, tá óhappið hendi.

# Dagstovnur í Kaldbak

**Á býráðsfundi hóskvøldið samtykti býráðið at keypa eini sethús í Kaldbak fyri 1,4 millión krónur. Tey skulu nýtast til barnaansing**

BARNAANSING
*Stefan í Skorini*

Býráðið í Havn hevur útvegað sær eini hús í Kaldbak, ið skal nýtast til barnaansing. Býráðið samtykti hóskvøldið at játta 1,4 milliónir til keyp av húsunum, sum liggja í nýggja býlinginum á Fløtum í Kaldbak.

Eigari av húsunum er Anfinn V. Hansen, advokatur, og hann hevur sjálvur vent sær til býráðið og bjóðað tí at keypa ognina til dagstovn.

Kommunan hevur kannað húsini og metir, at tey eru egnað til hetta endamálið. Tó skulu nakrar broytingar og ábøtur gerast fyrst. Hesar fara at kosta eina hálva millión, so samlaða íløgan fer at tátta í tvær milliónir.

Trivnaðarstjórin hjá kommununi mælti til at keypa ognina, um ein góð avtala fekst við eigaran. Tað sama gjørdi mentamálanevndin. Fíggjarnevndin mælti til at keypa ognina fyri 1,4 millión, og hetta er nú samtykt.

Pláss verður fyri 25 børnum í hesum nýggja dagstovninum. At byrja við vera bara í 16 børn á dagstovninum, meðan hini plássini verða nýtt til frítíðarskúla, har skúlabørn halda til eftir skúlatíð.

# Býráðið samtykti barnagarðar

**Samgongan í Tórshavnar býráð millum Sambandsflokkin og Fólkaflokkin samtykti á fundi hósdagin, at Høgni Mikkelsen skal byggja barnagarðin við Løgmannabreyt í Hoyvík, meðan Búsetur skal byggja tann á Hamrinum á Argjum**

BARNAGARÐAR
*Stefan í Skorini*

Tórshavnar býráð samtykti á fundi hósdagin at byggja tveir nýggjar barnagarðar við plássi fyri tilsamans 120 børnum.

Eftir at málið hevði verið í fíggjarnevndini varð ein broyting gjørd í tilmælinum frá mentamálanevndini. Meirilutin í mentamálanevndini mælti til, at Høgni Mikkelsen skuldi byggja barnagarðin á Hamrinum á Argjum, og Búsetur skuldi byggja barnagarðin við á Løgmannabreyt í Hoyvík.

Fíggjarnevndin mælti hinvegin til, at Høgni Mikkelsen skal byggja barnagarðin á Løgmannabreyt, meðan Búsetur byggir á Hamrinum. Hetta varð gjørt eftir ynski frá Høgna Mikkelsen og Búsetri.

Barnagarðurin á Hamrinum fer at kosta 8,4 milliónir krónur uttan mvg, og hin fer at kosta 6,8 milliónir uttan mvg.

Tilsamans nýtir býráðið 19,2 milliónir krónur av íløgukarminum, sum er 64 milliónir, til barnagarðarnar báðar.

### Ímóti tilráðing

Býráðið hevði annars sett ein bólk at geva tí eina tilráðing viðvíkjandi teimum innkomnu tilboðunum. Hesin metingarbólkur mælti til at lata Búsetur byggja báðar barnagarðarnar, tí býráðið fekk sum heild meira burturúr hesum, hóast tilboðini frá Búsetri vóru hægri enn tey hjá Høgna Mikkelsen.

Tó valdi býráðið at lata teimum báðum tilboðsgevarunum hvør sín barnagarð at byggja.

Øll andstøðan í býráðnum atkvøddi fyri uppskotinum hjá minnilutanum um at lata Búsetur byggja báðar ansingarstovnarnar, men samgongan atkvøddi ímóti. Andstøðan róði samstundis framundir, at her ruggaði ikki alt rætt í sambandi við, at Høgni Mikkelsen, ið sjálvur er limur í samgonguni fekk tann eina barnagarðin, hóast metingarbólkurin ikki mælti til hesa loysnina.

Síðani atkvøddi samgongan fyri tilmælinum hjá meirilutanum í fíggjarnevndini um at Høgni Mikkelsen og Búsetur byggja hvør sín ansingarstovn.

Heðin Mortensen, formaður í mentamálanevndini, metir, at kommunan fer at nøkta góð 92% av ansingartørvinum, tá hesi báðir dagstovnarnir lata upp.

Viðmerkjast skal, at Høgni Mikkelsen sjálvur ikki var hjástaddur á fundinum, tá málið um barnagarðarnar varð viðgjørt.



# Brennistøðin í Leirvík og í Havn eiga at leggja saman

**– Vit eiga at kanna møguleikan fyri at leggja brennistøðina hjá IRF og tað í Havn saman, sigur Schumann Hjaltalin, formaður í heilsu- og umhvørvisnevndini hjá Tórshavnar Býráð**

BURTURKAST
*Áki Bertholdsen*

– Nú á døgum verður tosað nógv um leggja kommunur saman. Hví so ikki eisini leggja kommunalar felagsskapir saman.

Tað heldur Schumann Hjaltalin, formaður í Heilsu- og umhvørvisverndini hjá Tórshavnar Býráð.

Hann sigur, at eins væl og kommunur verða sjóðaðar saman, átti eisini kommunalir felagsskapir eisini at verðið sjóðaðir saman, hóast tað gongur tvørtur um kommunumark.

Tað, hann hugsar um í hesum føri, eru teir báðir renovatiónsfelagsskapirnir, Interkommunali Renovatiónsfelagsskapin í Havn, sum hevur sína brennistøð á Sandvíkahjalla og IRF, sum umfatar restina av landinum og sum hevur brennistøð í Leirvík.

– Við tað, at vit hava tveir renovatiónsfelagsskapir í landinum, hava vit eisini tvey av øllum, sum hoyrir til. Vit hava tvær fyrisitingar, tvær brennistøðir og hvør felagsskapurin ger sær eisini sínar egnu kanningar og royndir, sum hin parturin ikki fær gagn av og tískil má gera umaftur.

– Tí haldi eg, at tað hevði verið skilagott at tikið stigið fult út og lagt báðar felagsskapirnar saman í ein felagsskap.

– Hesin felagsskapur kundi ikki bara staðið fyri at burturbeina rusk, men kann kundi umsitið alt, sum eitur umhvørvisvernd í landinum og savna tað undir sama hatti.

Schumann Hjaltalin sigur annars, at báðar brennistøðirnar hava havt eitt fyrimyndarligt samstarv, har brennistøðirnar hava "hjálpt" hvørjum øðrum. Brennistøðin í Havn hevur brent rusk fyri IRF, tá ið tað hevur staðið á og somuleiðis er alt jarn ført til Havnar. Hinvegin er spillolja úr Havn farin til IRF at verða burturbeind, fyri at nevna eitt dømi.



*– Tað hevði verið ein stórur fyrimunur at lagt báðar brennistøðirnar í landinum saman. Eitt nú standa báðar støðirnar fyri stórum ábótum. Bara til brennistøðina í Havn skulu einar 100 milliónir brúkast, sigur Schumann Hjaltalin, formaður í Heilsu- og umhvørvisnevndini hjá Tórshavnar Kommunu*

– Men eg dugi ikki at síggja nakra meining í, at báðir renovatiónsfelagsskapirnir gera íløgur í sama endamál.

Eitt nú er IRF farið at skilja rusk í Leirvík.

– Kann skiljiskipanin hjá IRF nøkta tørvin í øllum Føroyum, er tað meiningsleyst at Tórshavnar kommuna eisini fer at brúka pening til eina skiljiskipan.

– Einasta rætta loysnin hevði verið um vit samstarvaðu um alla burturbeining av ruski. Eitt nú kundi IRF eisini skilt rusk úr Tórshavnar Kommunu og so kundu vit brent fyri IRF, ella okkurt sovorðið.

– Kunnu vit samstarva um alt hetta øki, er tað ikki annað enn natúrligt, at vit taka stigið fult út og leggja báðar felagsskapirnar saman í ein.

### Ovurhonds ábøtur

Schumann Hjaltalin sigur, at bæði brennistøðin hjá IRF og tann í Havn eru við at koma upp í árini og standa fyri sera stórum ábótum, eitt nú fyri at lúka tey nýggjastu umhvørviskrøvini um, hvussu nógv av skaðiligum evnum tað er loyvt at lata út í natúruna við royki og øðrum.

– Hvat brennistøðini í Havn viðvíkur, verður talan um útreiðslur fyri einar 100 milliónir.

– Tí eiga vit at kanna, um tað ikki er rættast at byggja eina nýggja, felags brennistøð, heldur enn at gera tvær gamlar ístand, ella at hvør felagsskapur aftur byggir hvør sína nýggja brennistøð.

Hann heldur, at tað eiga at vera stórir fyrimunir í eini samanlegging.

– Eitt er, at utreiðslurnar tililøgur og rakstur fara uttan iva at lækka, tí tað fer at bera betri til at samskipa íløgur og rakstur í einum stórum felagsskapi.

Men nú kommunur verða lagdar saman, kann tað eisini henda, at kommunur, sum eru uppi í IRF fara at leggja saman við Tórshavnar Kommunu og so verður máað burturav grundarlagnum undir IRF.

– Tað er ongin orsøk til at tvíhalda um tveir felagsskapir, tá ið politiska rákið gongur hinvegin, tvs. ímóti samanlegging í størri og størri mun.

Formaðurin í Heilsu-og umhvørvisverndini sigur, at umsitingin hjá Tórshavnar Kommunu er nú farin at kanna, hvussu samstarvið ímillum teir báðar renovatiónsfelagsskapirnir í landinum virkar.

Somuleiðis skal umsitingin kanna, hvørjir møguleikar eru fyri at víðka samstarvið og Schumann Hjaltalin væntar at fáa eina frágreiðing um tað, áðrenn langt um líður og tá ber til at fara víðari við málinum.

# Eru nú til reiðar at basa oljudálking á Havnarvág

**Ein tilbúgvingarætlan er nú gjørd fyri, hvussu farast skal fram um havnarvág verður dálkað av olju**

OLJUDÁLKING
*Áki Bertholdsen*

Myndugleikarnir í Havn eru nú nógv betri fyrireikaðir til at taka olju upp, skuldi eitt óhapp hent, sum førdi við sær, at Havnarvág verður oljudálkað.-

Schumann Hjaltalin, formaður í Heilsu- og umhvørvisnevndini hjá Tórshavnar Býráð, sigur, at nú er rætt og slætt ein tilbúgvingarætlan gjørd sum greitt ásetir, hvussu farast skal fram, skuldi eitt óhapp hent, sum førir til, at Havnará verður dálkað av olju.

Hetta er hent í kjalarvørrinum á allari oljudálkingini, sum var á Havnarvág seinasta summar, tá ið sløkkiliðið javnan var til verka at taka olju upp á Havnarvág og eitt nú kravdi Bátafelagið, at Tórshavnar Býráð tók dálkingina í størsta álvara. Felagið vísti á, at útlendskir siglarar, sum komu á Havnina, søgdu, at Havnarvág var av skitnastu havnum at koma í.

Tá lovaði formaðurin í Heilsu- og umhvøvisnevndini, at Býráðið tók dálkingina í allarstørsta álvara.

Og tað varð ikki ligið á boðnum, tí Býráðið setti beinanvegin ein arbeiðsbólk at gera ein tilbúgvingarætlan fyri, hvussu mannagongdirnar skulu vera um oljudálking tekur seg upp á Havnarvág.

### Fastar mannagongdir

Síðani hevur hesin bólkurin arbeitt og hann hevur nú gjørt eina tilbúgvingarætlan fyri, hvussu arbeiðið skal skipast, verður Havnarvág dálkað.

Hendan tilbúgvingin er síðani samtykt og góðkend, bæði í Heilsu- og umhvørvisnevndini og í Havnanevndini hjá Tórshavnar kommunu.

Schumann Hjaltalin sigur, at í stórum er tilbúgvingarætlanin býtt sundur í stigum, alt eftir, hvussu umfatandi dálkingin er, tí alt eftir, hvuss umfatandi hon er, skulu fleiri og fleiri stovnar upp í málið.

– Men tað verður brandmeistarin, sum kemur at hava ovastu ábyrgdina av at basa dálkingini og sum samskipar arbeiðið. Tað verður brandmeistarin, sum skal hava fyrstu fráboðanina og tekur støðu til, hvat skal gerast og so tekur brandmeistarin, sum ger av, hvør annar myndugleiki skal dragast inn í málið og er illgruni um, at okkurt ólógligt er farið fram, sum krevur, at løgreglan skal uppí málið, eru eisini mannagongdir fyri, hvussu tað skal fara fram.

Eftir tilbúgvingarætlanini skal eisini nýstovnaða Umhvørvisdeildin hjá kommununu boðast frá, er vandi fyri, at oljudálkingin fer at føra aðra umhvørvisdálking.

Schumann Hjaltalin sigur, at hetta er ein tilbúgvingarætlan, sum stórur tørvur hevur verið á

– Hendingarnar seinasta summar, tá ið dálking ferð eftir ferð tók seg upp á Havnarvág vísti týðiliga at mannagongdirnar fyri, hvussu farast skuldi fram, vóru ikki nóg greiðar og at tað var eitt sindur ógreitt, hvør hevði ábyrgdina av hvørjum.

– Nú, vit hava fingið eina tilbúgvingarætlan, eru vit nógv betri fyrireikað til at basa eini oljudálking, enn vit hava verið, sigur Schumann Hjaltalin.

– Tað hevur ómetaliga stóran týdning at hvør stovnur, og hvør myndugleiki, hevur fulla greiðu á, hvør hevur ábyrgdina av hvørjum og, hvør samskipar arbeiðið. Og tað hava vit fingið nú, sigur hann.



*Seinasta summar var Havnarvág ofta dálkað av olju. Schumann Hjaltalin, formaður í Heilsu- og unhvørvisnevndini hjá Tórshavnar Kommunu sigur, at nú er tilbúgvingarætlan gjørd fyri, hvussu farast skal fram í slíkum førum*